# Pensjónistar læra at flenna

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívtl andøvsgul upp í ein strúk av norði og útnyrðingi, minkandi út á dagin. Sum frá líður færri kavæl og hitin millum ÷2 og +2 stig. Um náttina í støðum niður í ÷5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í stívt andøvsgul av norði, sum minkar út á dagin. Skýggjað og okkurt kavaælið. Hitin eitt vet oman fyri frostmarkið.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann frískar vindin upp í stívt andøvsgul av útsynningi. Skýggjað og regn vestaneftir. Hitin økist til millum 5 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul millum sunnan og vestan. Regn ella mjørki av og á. Hitin millum 5 og 7 stig.

**At vera pensjónistur, forðar einum ikki fyri at hoppa, gera øvilsir, klappa og - ikki minst - flenna. Triða páskadag varð skipa fyri láturskeiðið fyri pensjónistunum, í Eldratilhaldinum í Tórsgøtu.**



LÁTURSKEIÐ
*Birita Andreasen*

– Hesi fólkini eru simpulthen so yvirfrísk, sigur Vivian Guðmundsson, ið er láturinstruktør. Tað er eisini hon ið skipar fyri, nú pensjónistarnir fyri triðju og seinastu ferð eru á láturskeið.

### Læra at flenna

Her læra tey at flenna. Ikki við at hoyra ella siga skemtisøgur, men við at læra at anda og vera avslappaður.

Tá tær skulu byrja, stilla tær seg allar í ein ring, og byrja við at anda og gera nøkur øvilsir. Síðani siga tær sum Uffe Elleman, og latið verður upp fyri látrinum. Eftir tað ganga tær runt og heilsa. Tað verður gjørt við at taka í hondina, og geva hvørjum øðrum látur. Tað má sigast at rigga. Ikki tekur tað langa tíð, fyrr enn rúmið er fylt av látri.

Tá tær hava flent til tær ikki orka meir, fara tær eftir vatngløsunum. Vivian greiðir frá at tað er týdningarmikið at drekka nógv vatn. Tað er júst sum at vera í einum motiónssentriði, tí at kroppurin framkallar sama evni, sigur hon.

– Tá ið man hevur flent í ein minutt, so slappar kroppurin av í 45 minuttir, sigur Vivian.

### Sunt og gott

At flenna nógv, er bæði gott fyri likam og sál. Tað hjálpir uppá stress, hjarta og gikt; men omaná tað, so er tað eisini gott fyri eitt nú sjálvsálit og kærleika.

– Látur ger at man opnar seg, og tá fer smæðni av, sigur Vivian. Umfram tað at látur er stytsti vegur millum tvey menniskju, leggur hon aftrat.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 9 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 17 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 27 |
| New York | 12 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 28 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Vestaru megin eitt lágtrýst yvir Norskahavinum rekur køld luft inn yvir Føroyar av útnyrðingi.




Hósdagin kann roknast við at eitt hátrýst fer fram við Føroyum vestaneftir og í vikuskiftinum nærkast lágtrýst við brúgvaløgum við lýggjari luft av útsynningi.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/04 kl. 06⁰⁰–17/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,4°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 16/04 kl. 06⁰⁰–17/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 71,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

15. apríl: Seinna kvarter
17. apríl: Mánin longst frá jørðini
23. apríl: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. apr | 03.22 | 15.45 | 02.22 | 14.45 | 02.37 | 15.00 | 05.22 | 17.45 | 06.22 | 18.45 | 01.37 | 14.00 | 00.37 | 13.00 | 03.37 | 16.00 | 04.37 | 17.00 | 03.07 | 15.30 | 04.22 | 16.45 |
| 18. apr | 04.05 | 16.25 | 03.05 | 15.25 | 03.20 | 15.40 | 06.05 | 18.25 | 07.05 | 19.25 | 02.20 | 14.40 | 01.20 | 13.40 | 04.20 | 16.40 | 05.20 | 17.40 | 03.50 | 16.10 | 05.05 | 17.25 |
| 19. apr | 04.45 | 17.04 | 03.45 | 16.04 | 04.00 | 16.19 | 06.45 | 19.04 | 07.45 | 20.04 | 03.00 | 15.19 | 02.00 | 14.19 | 05.00 | 17.19 | 06.00 | 18.19 | 04.30 | 16.49 | 05.45 | 18.04 |
| 20. apr | 05.23 | 17.42 | 04.23 | 16.42 | 04.38 | 16.57 | 07.23 | 19.42 | 08.23 | 20.42 | 03.38 | 15.57 | 02.38 | 14.57 | 05.38 | 17.57 | 06.38 | 18.57 | 05.08 | 17.27 | 06.23 | 18.42 |

www.sosialurin.fo

GEV BLÓÐ